Fólkatingsval 20. november 2001

	Fólkaflokkurin A		Sambandsflokkurin B		Javnaðarflokkurin C		Sjálvstýrisflokkurin D		Tjóðveldisflokkurin E		Miðflokkurin H	
	2001	1998	2001	1998	2001	1998	2001	1998	2001	1998	2001	1998
Norðoyar												
1. Árnafjørður	17	9	4	5	1	4	0	4	15	13	2	
2. Fossánes	82	77	53	42	48	27	3	14	55	38	10	
3. Haraldssund	6	2	2	1	6	2	0	0	23	26	0	
4. Hattarvík	4	4	2	3	2	1	0	0	4	2	0	
5. Húsar	4	1	5	3	10	10	0	0	6	6	0	
6. Kirkja	0	0	5	2	2	1	6	7	2	0	0	
7. Klaksvík	808	681	407	234	580	448	135	196	696	527	43	
8. Kunoy	3	3	4	0	9	3	0	0	29	2	0	
9. Mikladalur	14	8	5	3	9	13	0	3	12	9	0	
10. Svínoy	9	13	11	6	5	1	0	0	11	9	0	
11. Syðradalur	1	1	0	1	0	1	0	1	5	2	0	
12. Viðareiði	80	87	26	12	37	25	1	2	31	28	1	
Tilsamans	**1028**	**886**	**524**	**312**	**709**	**536**	**145**	**227**	**889**	**689**	**56**	
Eysturoy												
13. Eiði	68	57	96	79	70	51	1	16	122	57	18	
14. Elduvík	1	1	8	11	9	6	0	0	1	2	0	
15. Fuglafjørður	191	213	236	128	208	138	4	21	252	163	8	
16. Funningsfjørður	7	0	8	8	15	8	0	2	12	15	0	
17. Funningur	11	12	8	10	15	11	3	9	17	10	0	
18. Gjógv	4	7	9	10	4	4	0	0	18	15	0	
19. Glyvrar	205	189	285	175	110	77	17	84	197	132	49	
20. Gøta	135	136	131	103	132	92	4	42	126	65	19	
21. Hellurnar	1	2	6	4	5	5	0	0	6	4	0	
22. Lamba	7	7	36	23	11	8	8	9	10	9	3	
23. Leirvík	128	149	88	48	115	89	6	23	133	105	5	
25. Oyndarfjørður	30	19	27	22	21	28	2	3	13	11	2	
26. Oyrarbakki	30	30	130	108	35	37	4	9	40	23	1	
27. Rituvík	5	10	70	65	19	15	2	22	40	29	9	
28. Selatrað	2	7	31	18	5	6	0	3	19	14	1	
29. Skála	46	38	110	85	105	72	5	33	78	58	6	
30. Skálafjørður	8	11	10	6	6	9	0	5	16	14	5	
31. Strendur	60	56	254	184	80	53	13	39	64	54	10	
32. Søldarfjørður	82	79	39	25	26	12	19	67	44	20	3	
33. Toftir	80	72	384	285	84	47	8	24	105	76	9	
34. Æðuvík	19	14	7	0	5	0	1	11	7	7	1	
Tilsamans	**1120**	**1109**	**1973**	**1397**	**1080**	**768**	**97**	**422**	**1320**	**883**	**149**	
Norðstreymoy												

Persónliga atkvøðubýtið

Listi A Listi A. Hin Føroyski Fólka flokkurin (Radikalt Sjálvstýri)	2001	1998
	5407	*5561*
Listin	265	*205*
Óli Breckmann	2335	*3961*
Bergur Bærendsen	51	*77*
Bjarni Djurholm	189	*274*
Deirdre Hansen	83	
Kjartan L. Joensen	97	*76*
Anfinn Kallsberg	1523	*342*
Jógvan við Keldu	161	
Jógvan á Lakjuni	199	*183*
Leita á Loftí	52	
Jørgen Niclasen	93	*103*
Jóanis Nielsen	45	
Ingi Olsen	59	
Jákup Olsen	52	
Rúna Sivertsen	70	*126*
Jógvan Sundstein	66	
Ingimar Tór Thomsen	29	
Eyðun Viderø	38	*30*

Listi B Sambandsflokkurin	2001	1998
	7196	*4506*
Listin	1294	*696*
Annfinn Brekkstein	64	
Johan Dahl	169	
Marjus Dam	225	
Súsanna Dam	63	*92*
Terje Davidsen	58	*64*
Olav Enomoto	128	
Finnleif Guttesen	72	*75*
Atli Hansen	147	*99*
Maria Hansen	62	*56*
Edva Jacobsen	81	
Eivind Jacobsen	133	
Sune Jacobsen	85	*108*
Alex Jespersen	28	
Edmund Joensen	955	*931*
Betta Joensen	97	
Jákup Joensen	25	*65*
Jóhan Petur Johannesen	60	
Kaj Leo Johannesen	319	
Jákup Lamhauge	133	
Gunnar Nattestad	70	
Bárður Nielsen	74	
Alfred Olsen	485	
Marjun Olsen	45	
Joen Peter Petersen	27	
Lisbeth L. Petersen	**2286**	*468*
Birgir Thomsen	11	

Listi C Javnaðarflokkurin	2001	1998
	6165	*4686*
Listin	536	*295*
Thomas Arabo	123	*84*
Jóannes Eidesgaard	3676	*1895*

Anfinn Kallsberg:

Vit missa tey varnu og tey ótolnu

Fólkaflokkurin klárar ikki at halda tey mest hóvligu og tey mest ótolnu sjálvstýrisfólkini innanborða, og tað hevði við sær ósigurin á valinum, heldur Anfinn Kallsberg

FÓLKATINGSVAL

Eyðun Klakstein

– Fólkatingssessurin kann brúkast til at fáa ávirkan í Danmark, og eg eri keddur um, at vit hava mist hendan sessin, sigur Anfinn Kallsberg

Uppgávan hjá Fólkaflokkin verður nú at fáa teir veljararnar, sum eru endaðir í Sambandsflokkinum og Tjóðveldisflokkinum, aftur til flokkin áðrenn løgtingsvalið.

Tað heldur Anfinn Kallsberg, sum ásannar at Fólkaflokkurin missir veljarar orsaka av sjálvstýrismálinum.

– Vit hava mist veljarar, sum halda at tað gongur ov seint í sjálvstýrismálinum, til Tjóðveldisflokkin, og hinvegin hava vit eisini mist tey, sum halda at tað gongur ov skjótt, til Sambandsflokkin, sigur Anfinn Kallsberg.

– Fólkatingsvalið er ikki tað sama sum løgtingsvalið, men tað vísir, at vit skulu taka løgtingsvalið í størsta álvara, og fáa fólkafloksfólkini innanborða aftur.

Nøgdur við persónliga úrslitið

Anfinn Kallsberg heldur, at valið gjørdist ikki so vánaligt, sum veljarakanningarnar spáddu frammanundan.

– Tað er vanligt, at Fólkaflokkurin stendur seg betur til val enn í veljarakanningum, og soleiðis var aftur hesaferð. Hóast eg eri sera keddur um, at vit mistu fólkatingsmannin, so kunnu vit fegnast um, at úrslitið var ikki so vánaligt, sum nógv roknaðu við frammanundan, sigur Anfinn Kallsberg.

Løgmaður var settur á listan hjá Fólkaflokkinum fyri at tryggja flokkinum sum mest av atkvøðum. Anfinn Kallsberg er væl dámdur sum løgmaður, og hendan undirtøkan skuldi brúkast til valið.

– Tá tú hugsar um, at eg fekk góðar 300 atkvøður seinast, og at eg hesaferð fekk fleiri enn 1500, so eri eg sera væl nøgdur við persónliga úrslitið. Vit høvdu eisini Óla Breckmann á listanum, og tað skapti eina størri breidd á listanum enn hjá eitt nú Javnaðarflokkinum, har formaðurin fór við tí mesta.

Lutvíst gekk Fólkaflokkurin 6,4 prosent aftur, og tí hevur løgmaður helst tikið meira atkvøður frá Óla Breckmann enn nøkrum øðrum.

Fólksins vilji

Hevur Fólkatingssessurin í grundini nakran týdning?

– Ja, tað hevur hann. Fólkatingssessurin kann brúkast til at fáa ávirkan í Danmark, og eg eri keddur um, at vit hava mist hendan sessin.

Hvat heldur tú um, at Tjóðveldisflokkurin nú skal umboða sjálvstýrisvongin í føroyskum politikki?

– Flokkarnir, sum verða valdir í Fólkatingið, umboða hvørki nakran vong, samgongu ella andstøðu. Teir umboða seg sjálvan sum flokk, og tað fer Tjóðveldisflokkurin eisini at gera.

Lítk er til, at tað verður Tórbjørn Jacobsen, sum í fyrstu syftu ferð at røkja fólkatingssessin hjá Tjóðveldisflokkinum. Hvat heldur tú um tað?

– Tað havi eg onga viðmerking til, uttan at tað er sera umráðandi, at vit øll virða fólksins vilja. Fólkið hevur givið Torbjørn Jacobsen stóra undirtøku, og tað er tað einasta, sum hevur týdning í hesum samanhangi.

Heini misti 1000 atkvøður

Fyrrverandi formaðurin í Tjóðveldisflokkinum heldur, at tað var væntandi, at hann fekk nógv færri atkvøður á fólkatingsvalinum hesaferð

FÓLKATINGSVAL

Eyðun Klakstein

– Norðoyingar hava verið sera sjónligir í Tjóðveldisflokkinum, men tað eru vit ikki longur, og tað hevur ivaleyst ávirkan á úrslitið her norðuri, sigur Heini O. Heinesen

Heini O. Heinesen fekk stívliga 200 atkvøður á fólkatingsvalinum týsdagin, og tað var umleið 1000 atkvøður færri enn fyri fýra árum síðani.

Fyrrverandi formaðurin í Tjóðveldisflokkinum er ikki ovfarin av stóru persónligu afturgongdini.

– Eg var formaður í flokkinum á seinasta fólkatingsvali, men tað eri eg ikki longur. Tað ger, at eg misti eina rúgvu av atkvøðum. Harafturat vóru fýra tjóðveldisvalevni í Norðoyggjum, so kappingin var hørð, sigur Heini O. Heinesen.

– Eg hevði væntað, at gongdin fór at vera soleiðis, men eg eri keddur av, at undirtøkan fyri flokkinum í Norðoyggjum ikki var størri, enn hon gjørdist. Norðoyingar hava verið sera sjónligir í Tjóðveldisflokkinum, men tað eru vit ikki longur, og tað hevur ivaleyst ávirkan á úrslitið her norðuri, sigur hann.

Hava mist ávirkan

Heini O. Heinesen heldur, at okkurt má gerast, um Tjóðveldisflokkurin skal fáa gott val í Norðoyggjum til løgtingsvalið komandi ár.

– Málið hevur verið, at vit skuldu fáa tveir tingmenn í Norðoyggjum, men tí málinum eru vit langt frá í løtuni. Tað kann fara at kosta til løgtingsvalið, at norðoyingar ikki hava størri ávirkan í Tjóðveldisflokkinum.

– Vit mugu standa meira saman í Norðoyggjum eisini, og tað fer ikki at skaffa Tjóðveldisflokkinum tveir tingmenn í Norðoyggjum, um eg skal haldast niðri, sigur Heini O. Heinesen.

Tobbi gjørdi bart

– Eg havi tað nógv lættast við at gera beint soleiðis, sum eg meti verða rætt, og tað ætli eg mær eisini at gera í fólkatinginum, sigur Torbjørn Jacobsen

Stundum óstortliga framferðin hjá tjóðveldismanninum loypti ikki kvøkk á veljararnar. Tórbjørn Jacobsen fekk fleiri persónligar atkvøður enn tveir heilir flokkar tilsamans

FÓLKATINGSVAL

Eyðun Klakstein

Torbjørn Jacobsen sleppur í Fólkatingið. Tað er greitt eftir fólkatingsvalið týsdagin.

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum fekk flestar atkvøður, men hann ætlar sær at halda fram sum landsstýrismaður restina av valskeiðnum.

Tí verður tað næsti maðurin á listanum, sum skal taka við, og tað fyrrverandi landsstýrismaðurin við mentamálum. Skiparin á Glyvrum.

– Hetta var eitt sera gott val, og eg dugi ikki rættiliga at siga, hví eg havi fingið so nógvar atkvøður, sigur Torbjørn Jacobsen.

Torbjørn Jacobsen var púra ókendur á seinasta fólkatingsvalið, men tá fekk hann stívliga 400 atkvøður, og hesaferð tvífaldaðist atkvøðutalið.

– Seinastu árini havi eg verið nógv í politiska miðdeplinum, og tað hevur sjálvandi havt sína ávirkan. Kanska uppfata fólk meg ikki sum so óstortligan, sum summi royna at gera meg til, sigur hann.

Torbjørn Jacobsen ætlar sær ikki at broyta stílin hjá sær, nú hann skal umboða Føroyar á fólkatingið.

– Eg havi tað nógv lættast við at gera beint soleiðis, sum eg meti verða rætt, og tað ætli eg mær eisini at gera í fólkatinginum, sigur Torbjørn Jacobsen.